Fylgiskjal 7

P/F Líraberg
Norðstíggjur 3,
FO 160 Argir
Tel. nr.: 21 88 87
liraberg@olivant.fo

Argir 4. januar 2026

Postboks 347
Yviri við Strond 15
110 Tórshavn

Hoyringssvar í samband við ætlaðu broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
Hetta hoyringssvarið rættar seg bert ímóti ætlaðu broytingunum í § 22.

(Tey uppáhald undirritaði kemur við hesum skrivi, verða dokumenteraði í fylgiskjalinum)

Sambært ráðnum er endamálið m.a. : fáa [heimildir] ella nágreina heimildir til at skipa fiskiskapin, at boða frá útlutan .....

Ætlaninn hjá Ráðnum er at strika § 22, stk. 1 Lex speciales fyri Føroyabanka og leggja hana niður í § 22, stk. 1, sum de facto er pendantur til gomlu LVF § 21, stk.1, reglur um ó-skipaðir fiskastovnar (alternativar fiskiastovnar), har rættindini ikki vóru/eru býtt, og har løgtingið longu í 1994 gav landsstýrismanninum allar heimildir.

Fyrisitið í heimildarloysi
Í viðmerkingunum til broytingina í § 22, staðfestir Fiskimálarðaðið sjálvt, at tað hevur fyrisitið í heimildarloysi í fleiri ár. Citat:

> *Staðfest er, at stk. 1 ikki er heimildin at skipa fiskiskapin á Føroyabanka. Heimildin er bert í stk. 2.*

Hevur heimilsarleysa fyrisitanin nakað við at gera at, landsstýrismaðurin hevur for fáar heimildir, for ógreiðar heimildir ella skyldast tað, at førleikin í ráðnum ikki er til staðar?

1. Hugtakið "at skipa fiskiskap"
Sambært ráðnum er eitt av endamálunum við broytingini at "*fáa* [heimildir] *ella nágreina heimildir til at skipa fiskiskapin"* . Hetta hugtakið "at skipa fiskiskap" hevur Fiskimála-ráðið brúkt umaftur og umaftur í áravís. Men hvat merkir hugtakið?

Hugtakið er ongantíð vorðið allýst yvirhøvur, hvørki í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994, ella í teimum seinnu fiskivinnulóggávunum og hóast hetta, so er hetta sjálvt kjarnihugtakið, sum ráðir brúkar tá tað fyrisitur.

Hvussu kann ráðið tosa um "nágreinan" av heimildum tá eingin – ikki ein gongd ráðið sjálvt – veit hvat "objektið" fyri "skipan av fiskiskapi" er? Er objektið útlutan og býtið av fiskirættindum ella er objektið økisfriðingar, meskastøddir, friðingartíðir v.m? eingin veit, hví? tí hugtakið ongantíð er vorðið allýst.

Er tað nettup nýtslan av hesum einkisigandi hugtakið, sum hevur viðført at Fiski-málaráðið staðfest hevur fyrisitið í heimildarloysi á Bankanum í fleiri ár? Var tað ein misskilt nýtsla av einkisigandi hugtakinum, sum noyddi Dennis Holm frá?

Eitt liggur so rímuliga fast, at hugtakið "at skipa fiskiskap" – hvat enn tað so fevnir um - so kann tað ongantíð verða ein heimild hjá landsstýrismanninum at inndraga lógarfest rættindi, fyri at lúta og býta hesi umaftur.

Hugtakið "tøkir fiskimøguleikar" (les fiskirættindi)
Av § 22, stk. 1 og í § 23, stk. 2 í galdandi lóg framgongur hugtakið "tøkir fiskimøguleikar" og at hesar kann landsstýrismaðurin útluta og býta. Men havt merkir hugtakið, tað er ikki allýst? Hvussu veit landsstýrismaðurin hvat hann kann býta, um hann ikki veit hvat "tøk" rættindi eru?

Lógin um vinnuligan fiskiskap
Í lógini um vinnuligan fiskiskap (1994) hevði landsstýrismaðurin onga heimild yvirhøvur at røra við rættindi, øll vóru skipaði og býtt í skiftisreglunum í lógini – eisini Føroyabanki. Men tað vóru nøkur undantøk: loyvi til royndarfisikiskap § 20, stk. 2, loyvi til fiskiskap í samband við menningarætlanir § 20, stk. 3, loyvi til fiskiskap av *óskipaðum* fiskasløgum § 21, stk. 2 og 3. mánarðar reglurnar í § 29, stk. 3.

Longu í 1995 – eftir at løgtingið mitt í einum fiskiári hækkaði eina toskakvota – var tá-sitandi landsstýrismaðurin at ein meirkvota vóru *tøk* fiskirættindi. Ráðið varð seinni dømt fyri óheimilaða útlutan og býtið av lógarfastsettum rættindum (BS 838/1995). Ráðið rindaði millióna endurgjald.

Føroyabanki
Rættindi á Føroyabanka vórðu lógarfest rættindi í 1994 (skiftisreglurnar kap. 7). Í 1996, tá farið var frá kvotum til fiskidagar var sagt í viðm. til §§ 27 og 28 (Løgtingstíðindi 1995, s. 517):

- *"Veiðiflotin verður samansettur sum higartil og bólkarnir varðveita sama prosentpart av tilfeinginum á føroysku landleiðunum* [les landgrunninum + Føroyabanks] *sum higartil."*

Hvussu er Fiskimálaráðið komið til, at rættindi á Føroyabanka eru vorðin tøk rættindi hjá einum landsstýrismanni at býta? Nær og hvussu er tað gjørt? Hevur Fiskimálaráðið kannað, at tað nettup *ikki* var av tilvild, at løgtingi onga heimild at býta setti í § 22, stk. 2, mótsætt § 22, stk. 1 (alternativir fiskastovnar)?

Áheitan

Undirritaði fer staðiliga at heita á ráðið áðrenn ráðið rørir § 22 so at greina og allýsa hugtøkini ávikavist "at skipa fiskiskap" og "tøk rættindi".

Til ætlanina ætlanina um at biða løgtingið um eina heimild til eina fráboðarnaskipan heldur enn við til t.d. dømis kunngerð havi eg hesa viðmerking. Tað er eitt ósamsvar millum tað, sum Fiskimálaráðið sigur at endamálið við broytingini er og tað sum framgongur av viðmerkingunum.

Endamálið er at boða frá útlutan, en hvussu skal hetta skiljast, er tað ein fráboðan um at tað er útlutan ella er tað útlutanaraktin sjá. Í viðmerkingunum til lógarbroytingina verður einki asgt um útlutan.

Vit liva í einum rættarstati og Fiskimálaráðið umsitur eina lóg, sum skipar atgongdina til milliardavirðir hjá føroysku tjóðini, tað og bert tað eigur at hava fyrsta prioritet tá ráðið heitir á løgtingið um fleiri heimildir – til hvat ítøkiliga?

Vegna P/F Líraberg

Óli Jacobsen